# Bilar

**Magnus Gunnarsson**
*maggi@sosialurin.fo*





*Ein Tesla Roadster kemur til Føroya í februar*

# Elektriskur sportbilur til Føroya

**Til elbilaráðstevnuna, sum verður í Norðurlandahúsinum týsdagin 15. februar, kemur ein Tesla Roadster, ið er ein sera kvikur el-drivin sportbilur**

Týsdagin 15. februar verður ein elbilaráðstevna í Norðurlandahúsinum, sum elfelagið SEV skipar fyri saman við Jarðfeingi. Á ráðstevnuni fara umboð fyri orkufeløg í Íslandi, Grønlandi og Føroyum at sammeta elbilaroyndir sínar higartil í teimum trimum Útnorðurlondunum.

Í hesum sambandi hevur SEV m.a. boðið umboðum fyri Tesla Motors í Danmark at koma higar at vísa Tesla Roadster sportbilin fram. Saman við bilinum koma tvey umboð fyri Tesla Motors til Føroya við Norrønu tann 14. februar. Hesi fara at greiða innbodnu luttakarunum á ráðstevnuni nærri frá bilinum og virkseminum hjá Tesla Motors á elbilaøkinum.

Tesla Roadster er ein sera kvikur bilur, sum koyrir frá 0-100 km/t upp á undir fýra sekund.

Elmotorurin við 248 hk verður drivin av lithium-ion battaríum. Toppferðin er umleið 200 km/t, og bilurin koyrir millum 330 og 350 kilometrar upp á eina løðing, skrivar heimasíðan hjá SEV.



Tilsamans fimm elbilar verða í Føroyum, meðan ráðstevnan er. Umframt Tesla Roadster verða tveir Peugeot Partner og ein Mitsubishi iMiEV hjá SEV og ein Mitsubishi iMiEV, sum verður í Føroyum í sambandi við norðuratlantiska samstarvið NORA.

Kaliforniska bilverksmiðjan Tesla Motors var stovnað í 2003, og Tesla Roadster kom á marknaðin í 2008. Í Danmark kostar ein Tesla Roadster væl yvir 700.000 krónur.

*mg*

## Fyrsti elbilur

Fyrsta almenna evropeiska krasjtestin av einum elbili varð gjørd við sera góðum úrsliti, verður sagt frá evropeiska felagsskapinum fyri trygd í bilum EuroNCAP og týska bilfelagskapinum ADAC.

Talan var um elbilin Mitsubishi iMiEV, sum varð krasjtestaður við sera góðum úrsliti. 2011 verður árið, tá elbilarnir av álvara koma á danska marknaðin, tí er tað av stórum týdningi fyri okkum at vita, at teir eru nóg tryggir, sigur Søren W. Rasmussen biltekniskur redaktørur á FDM limablaðnum Motor. Mitsubishi iMiEV, Citroën C-Zero og Peugeot Ion eru somu bilar við hvør sínum identiteti.

*mg*




*Mitsubishi iMiEV til krasjtest hjá EuroNCAP*

**Hósdagin 27. januar kl. 16.10**

Í sendingini er samrøða við Terkel Spangsbo og Suzanne Zabava frá danska fakbladnum Motormagasinet, sum fyrireika ein túr til Føroya fyri fólk frá donsku bilbransjuni.

Eisini verður hybridbilurin Toyota Auris HSD royndarkoyrdur saman við Høgna Háberg Hansen, sølumanni hjá Reyni Service. Jákup á Borg frá Bilrøkt fortelur um nýggja bilportalin Bilrokt.fo.

Í sambandi við at ein amerikanskur Tesla elbilur kemur til Føroya til elbilaráðstevnunu í Norðurlandahúsinum 15. februar verður eina samrøðu við Kim Madsen frá Tesla Motors í Danmark. Eisini er ein samrøða við Helene Lund Juul frá Better Place í Danmark.



Høgni Háberg Hansen

Jákup á Borg

Suzanne Zabava

Vinnu- & bílradio á Rás 2